Maðkur herjar føroyskar teldur

Í gjár og fyrradagin blivu nógvar føroyskar fyritøkur raktar av telduvirusi, einum sonevndum »maðki«. Tá hesin maðkur er komin inn á telduna sendir hann innkomin teldubrøv víðari til tilvildarligar e-postadressur í adressulistanum, og síðan slettar hann alt á telduni

Rúnar Reistrup

Á Formula.fo hava tey havt úr at gera seinastu dagarnar. Fyritøkur hava ringt og biðið um hjálp, tí knappliga er e-postforrit teirra farið undir at senda teldubrøv út til adressur á adressulistanum. Og hjá onkrum er alt, sum fyrr var á telduni, slettað. Orsøkin er eitt serliga skaðiligt telduvirus, sum hevur breitt seg millum føroyskar teldubrúkarar seinastu dagarnar.

Serligur maðkur

Tað er ikki óvanligt at telduvirus breiða seg við at senda seg sjálvan út til aðrar teldur sum e-post. Hetta slag av virus verður vanliga nevnt »worm« ella ein »maðkur«. Men tað serliga við hesum maðkinum, sum hevur herjað føroyskar teldur seinastu dagarnar, er, at hann ikki bara sendir seg sjálvan víðari - hann sendir eisini ymisk teldubrøv, sum liggja á telduni, víðari til tey, sum standa á adressulistanum í e-postforritinum.

So hevur tú eitt teldubræv við einari bakiuppskrift liggjandi á telduni, sum so verður rakt av hesum maðkinum, verður bakiuppskriftin send víðari til onkran av teimum, sum tú hevur standandi á tínum adressulista.

Virkisloynidómar sendir út

Tá talan er um bakiuppskriftir er skaðin ikki so álvarsligur. Men søgan er ein heilt onnur, tá teldubrøv við loyniligum virkisupplýsingum hjá einari fyritøku verða send út til aðrar fyritøkur. Og tað er júst tað, sum onkur føroysk fyritøka hevur verið úti fyri seinastu dagarnar, verður sagt av Formula.fo.

Formula.fo er ein av landsins størstu umsitarunum av telduskipanum. Har hava starvsfólkini sæð nógv ymisk telduvirus, men hetta, sum nú herjar, hoyrir til tey álvarsligu, tí avleiðingarnar kunnu vera rættiliga skaðiligar fyri tær raktu fyritøkurnar.

Loysir seg at verja

Telduvirus er ein afturvendandi trupulleiki, men til ber at verja seg ímóti hesum, við at nýta antivirus forrit. Forritini verða allatíðina uppdaterað við upplýsingum um nýggjastu virusini, og tí veita tey rættiliga góða trygd mótvegis virusálopum. Men tað kostar pening at nýta tey, og tí velja summar fyritøkur at liva fyriuttan hesa virusverju.

Men hetta kann lætt gerast ein dýr søga, tí telduvirus gerast alsamt fleiri og gera meira álvarsligan skaða.

Ikki Code Red

Av Formula.fo verður sagt, at fyrstu ferð tey gjørdust varug við tann herjandi »maðkin« var um miðjan juli mánað. Men hann hevur ligið í dvala, og fyri trimum døgum síðan fór hann rættiliga at breiða seg millum føroyskar teldur.

Maðkurin, sum herjar her á landi í løtuni, hevur tað heldur kryptiska heitið w32.sircam.worm@mm. Talan er soleiðis ikki um »Code Red-maðkin«, sum BBC og aðrir miðlar ávaraðu teldubrúkarar um allan heim ímóti fyri trimum døgum síðan. Hesin maðkurin hevur ikki gjørt so um seg, sum stúrt varð fyri, tí fyritøkur vóru ávaraðar frammanundan.



Løgmaður:

Tak ikki forskot uppá trupulleikarnar

– Vit hava nóg mikið av trupulleikum sum er, so tað er eingin orsøk at taka nýggjar trupulleikar út úr luftini, sigur løgmaður um orðini hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við sjálvstýrismálum, um, at ein samtykt av uppskotinum um Búskapargrunn Føroya kann gerast eitt brátt farvæl til blokkin

BÚSKAPARGRUNNUR
Rúnar Reistrup

Hóast landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum í Sosialinum í gjár vísti á, at júst málið um Búskapargrunn Føroya kann gerast dropin, sum fær donsku stjórnina at venda tímaglasinum og seta fýra ára skiftistíðina í gongd, og at tað má politiska skipanin í Føroyum vera fyrireikað uppá, so hevur løgmaður ongan hug at byrja nakað kjak um hetta.

– Eg haldi at tað er at dyrka nakrar trupulleikar, sum ikki eru har, um vit longu nú skulu fara at fyrireika okkum uppá, hvat danir møguliga fara at halda um búskapargrunnin, tá hann verður samtyktur, sigur løgmaður.

Skulu verða fyrireikað

Løgmaður er tó samdur við landsstýrismanninum við sjálvstýrismálum í, at politiska skipanin í Føroyum eigur at vera fyrireikað til at danska stjórnin kann fara undir minka blokkin burtur.

– Vit skulu vera innstillað uppá, at blokkurin úr Danmark kann fella burtur nær tað skal vera. Um dan ir ætla at skera blokkin burtur eftir fýra árum, so kunnu teir gera teir tað uttan at spyrja nakran eftir. Og tað er tað, sum vit nú royna at búgva føroyska búskapin til, millum annað við búskapargrunninum, sigur Anfinn Kallsberg, sum tó ikki væntar, at júst málið um Búskapargrunn Føroya fer at seta ferð á eina slíka gongd.

– So leingi vit arbeiða eftir samtyktu ætlanini um at vit skulu yvirtaka málsøki og samstundis yvirtaka fíggjarligu ábyrgdina av teimum, dugi eg ikki at siggja hví danska stjórnin skal reagera upp á tað. Eftir tí, sum vit hava fingið at vita frá donsku stjórnini, so tekur hon undir við hesi gongdini.

Týdningarmikið mál

Tá tað er sagt má løgmaður kortini ásanna, at danska stjórnin ikki vísir so nógva vælvild í yvirtøkuarbeiðinum.

– Tí havi eg eisini boðað frá í Løgmansrøðuni, at tað helst verður eitt trupult heyst. Men at taka forskot uppá hvat danska stjórnin heldur um búskapargrunnin, og hvørjar trupulleikar tað møguliga kann geva, fari eg ikki at gera. Búskapargrunnur Føroya er tað mest umráðandi málið í sambandi við allan framtíðar búskaparpolitik í Føroyum yvirhøvur, tí hann er so nógv meira enn bara ein skiftisgrunnur til at fíggja sjálvstýri við, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður í viðmerking til orðini hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, um møguligu avleiðingarnar, sum málið um Búskapargrunn Føroya, kann hava fyri viðurskiftini við Danmark.

Mærsk skipari tikið yvir

Nýggi nevndarformaðurin í Maersk Air er kendur millum føroyingar, sum hava siglt við skipunum hjá AP Møller

FLOGFERÐSLA
Edvard Joensen

Nýggi nevndarformaðurin í Maersk Air, Troels Dilling, er væl kendur millum føroyingar, sum hava siglt hjá AP Møller
Mynd: Edvard Joensen

Nýggi nevndarformaðurin í Maersk Air eitur Troels Dilling. Hann er fyrrverandi skipari hjá AP Møller og hevur millum annað havt fleiri føroyingar umborð á skipum sínum.

Troels Diling hevur eisini verið nevndarformaður í Maersk Air fyrr. Tað var í tíðarskeiðnum 1990 til 1996, tá Bjarne Hansen tók yvir.

Umframt hevur hann millum mong onnur størv hjá AP Møller eisini verið skipasmiðjustjóri á Lindø. Hann verður av summum roknaður sum høgra hond hjá Mærsk Mc- Kinney Møller. Nevnast kann, at hann plagar at vera skipari á stuttleikabátinum hjá stjóranum.

Sum nýggjur stjóri í flogfelagnum Maersk Air er settur Flemming Ipsen, sum í dag starvast sum deildarleiðari hjá AP Møller í Singapore.

Tá hann kemur í nýggja starvið, fe Bjarne Hansen, fyrrverandi nevndarformaður og skipsreiðari, í starvið, sum Flemming Ipsen fer úr í Singapore.

Hundrað milliónir og tvey størv

Kartelavtalan við SAS hevur higartil kostað Mærsk Air 100 milliónir í bót, umframt størvini hjá bæði nevndarformanninum, Bjarne Hansen, og stjóranum, Ole Dietz.

Maersk Air og SAS høvdu gjørt eina sínámillum avtalu um, hvussu rutunar í Skandinavia skuldu røkjast, soleiðis at feløgini heldur samstarvaðu enn kappaðust. Tey býttu stutt sagt í sínámillum.

Tað metti ES-nevndin ikki vera lógligan arbeiðshátt og álegði báðum feløgunum stórar bøtur. Fyri Maersk Air var talan um 13.125 milliónir Evrur ella umleið 100 milliónir danskar krónur.

Hesum kundi felagið ikki liva við, sigur Mærsk Mc-Kinney Møller í tíðindaskrivi, sum sent er út tann 1. august. Samstundis boðar hann frá, at leiðslan í flogfelagnum er skift út.

Sagt verður, at Bjarne Hansen hevur gjørt av at fara úr sessinum sum nevndarformaður, og at Ole Dietz hevur ynskt at fara úr stjórastarvinum. Ole Dietz heldur fram sum stjóri í Maersk Air august mánaða út.

Umframt at vera stjóri í Maersk Air røkir Ole Dietz eisini onnur álitisstørv í felagnum. Hvussu verður við hesum størvum, er ikki støða tikin til enn.

Afturstig

Fyri Bjarne Hansen má tað metast eitt rættiligt afturstig at gerast deildarleiðari í Singapore.

Hann var til 1. august tann triðji í røðini yvirhøvur innan risafyritøkuna AP Møller. Bara Mærsk Mc-Kinney Møller sjálvur og varastjórin, Jess Søderberg, vóru yvir honum.

Bjarne Hansen byrjaði í AP Møller fyritøkuni sum shippingnæmingur í 1957 og hevur síðan støðugt verið á veg uppeftir. Hann hevur millum annað verið privatskrivari hjá »Hr. Møller«, sum Mærsk Mc-Kinney Møller verður nevndur í firmanum. Eisini hevur hann verið ein drívmegin í arbeiðinum at fáa Mærsk Air til tað, felagið er í dag.

Í 1999 varð hann settur í starv á sjálvum høvuðssætinum á Esplanaden, har hann gjørdist skipsreiðari og leiðari fyri allari oljuleiting hjá felagnum.

Tað hevur ljóðað, at SAS beyð honum aðalstjórasessin, tá Jan Stenberg í fjør legði frá sær, men at hann tá segði nei takk.

Føroyskur dansur í Øravík

Almenn dansinátt verður hildin á Hotel Øravík leygarkvøldið 11. august. Hotellið og dansifeløgini í oynni skipa fyri

FØROYSKUR DANSUR
Edvard Joensen

Almennur føroyskur dansur við borðhaldi verður á Hotel Øravík leygarkvøldið 11. august. Tiltakið varð hildið fyrstu ferð í fjør og eydnaðist væl, sigur stjórin á hotellinum, Uni Mortensen.

Tiltakið byrjar við borðhaldi, sum verður skipað sum eitt vanligt, føroyskt veitsluborð, sigur Uni Mortensen. Umleið miðnátt ella so væntar hann, at føroyski dansurin fer at byrja.

Tiltakið er alment, og tað eru dansifeløgini í Suðuroy sum saman við Hotel Øravík skipa fyri.

Tá tiltakið í fjør varð hildið fyri fyrstu ferð, vóru umleið hálvtannaðhundarð fólk við, og tað gekk heilt væl. Og longu nú eru fólk, sum hava tryggjað sær luttøku, sigur Uni Mortensen. Fólk hava biðið um gisting á hotellinum í góðari tíð. Tó leggur hann afturat, at enn er ikki fult.

Tað eru ikki bara suðuroyingar, sum koma til hetta tiltakið, sigur hann. Eisin fólk norðanfjørðs hava bílagt sær hotelrúm.

Tað tykist, sum at fólk taka hetta tiltakið sum ein møguleika at hitta fólk eins væl og at dansa.

Tað vísti seg seinast, at her hittust fólk, sum ikki høvdu hitst í mong ár. Og soleiðis kunnu fleiri element vera í einum slíkum tiltaki, heldur hotelstjórin.

At tiltakið er alment merkir eisini, at tað ber til at koma til annaðhvørt bara borðhaldið ella bara til dansin aftaná, um ein ynskir tað.